# *O, Kringvarpið!*

### *3. partur*

### *"Vit gingu á vatninum og dusaðu okkum í marglæti"*

***Suni Merkistein í sendingini O, móðurlandið!***

*Vit ilskast inn á danir, tí teir nøkur ár í 90´unum kanska ikki heilt uttan grund hartaðu okkum, meðan vit í meiri enn eina øld uttan stórvegis grund hava eyðmýkt teir!*

Kringvarpið hevur nú sent 3. part av sendirøðini *O, móðurlandið!* sum gongur fram til 1990´ini.










Millum tema´ini, sum hava verið í 1. og 2. parti, eru m.a. koloniir og fólkamorð!! Í 3. parti er eitt av høvuðstema´unum gongdin fram ímóti og kollapsið av føroyska samfelagnum fyrst í 1990´unum.

Nógv av tí, sum verður framborið her, er rætt og samstundis áhugavert at síggja og eigur KvF rós fyri hendan partin. Men tíverri er søguforteljingin bert hálv, við tað, at KvF hegnisliga velur viðmerkjarar, sum í størsta møguligan mun stuðla upp undir narrativ KvF´s og tess nationalistisku agenda:

| ***Viðmerkjarar í 3. parti*** | |
|---|---|
| ***Navn*** | ***Starvsheiti samb. KvF*** |
| Óli Breckmann | Fyrrv. løgtings- og fólkatingslimur |
| Heðin M. Klein | Fyrrv. landsstýrismaður (T) |
| Torbjørn Jacobsen | Fyrrv. løgtings- og fólkatingslimur (T) |
| Herman Oskarsson | Búskaparfrøðingur |
| Hans Andr. Sølvará | Professari í søgu |
| Rói Patursson | Heimspekingur, fyrrv. háskúlastjóri og yrkjari |
| Carl Jóhan Jensen | Rithøvundur |
| Høgni Hoydal | Formaður Tjóðveldi |
| Sjúrður Skaale | Fólkatingslimur |
| Hanus Kamban | Rithøvundur |
| Jóan P. Joensen | Fólkaminnisfrøðingur |
| Ingi Rasmussen | Journalistur og útvarpsmaður |

Eisini verða landsstýrisskeiðini í 1970´unum, 80´unum og fyrst í 90´unum vavd saman, so tað als ikki framgongur, hvat ið hendi undir hvørjum landsstýri, hvat orsøkin var og nær ógvusligi vøksturin í bæði vinnustuðli, t.d. ráfiskgrunni, uttanlandsskuld og veðhald fyri skipabyggingum var.

Dagfestingar eru hegnisliga kliptar burtur ella fjaldar í skjølum, sum skulu gera tað út fyri at verða dokumentatiónir, sum undirbyggja hálvu søguforteljingunum hjá KvF, sum tí blíva beinleiðis villleiðandi og partvíst eisini søgufalsan.

Vit ilskast inn á danir, tí teir nøkur ár í 90´unum kanska ikki heilt uttan grund hartaðu okkum, meðan vit (les loysingarfólk) í meiri enn eina øld uttan stórvegis grund hava eyðmýkt teir! Besta dømi og prógv um hetta er júst umrødda sending, enntá í 6 pørtum!

Kringvarp Føroya! Hvar er:

- ⇒ **trúvirðið?**
- ⇒ **fakligi stoltleikin?**
- ⇒ **virðingin fyri lógarásetingum, sáttmálum og egnum kjarnuvirðum?**
  (sendingar skulu vera: *sakligar, óheftar, álítandi, savnandi, dygdargóðar, fjøltáttaðar, ikki á nakran hátt elva til mannminkan, halda góðan fjølmiðlasið, hava størsta trúvirði og vera professionellar)*

Og henda sending er bert 3. av 6 - uha, uha. Nær næsta sending kemur, er ikki greitt, men kanska møguleiki verður at endurskoða innihaldið, so at tað meiri verður í tráð við tað, sum KvF eigur at standa fyri?

Johan Petersen